# MEG AT VERÐA



ARBEIÐI

*- At arbeiða á eini smoltstøð er spennandi, men tað krevur sítt, sigur 24 ára gamla Sólvá Eyðunsdóttir Jacobsen. - Mær dámar væl hetta arbeiðið*

## 8 til 5

**Í eina tíð eru fyrireikingar gjørdar til at lata eina smoltstøð uppaftur her í Svínoy, og er hon nú so smátt farin í gongd. Hvønn morgun klokkan 8 møtir Sólvá til arbeiðis saman við hinum monnunum á støðini, og fer til hús aftur klokkan 5, bert avbrotin av einum døgurðasteðgi.**

**- Her er nógv nýtt at læra og nógv at taka hensyn til, so tað er eitt sindur strævið onkutíð. Men eg vænti, at tað verður uppaftur betri, tá eg fari at koma meiri inn í arbeiðið.**

**- Mær dámar arbeiðið ordiliga væl, og eg vóni at smoltstøðin kann koma væl í gongd og verða verandi her, sigur hon.**

at vera hjá okkum børnum, og nógv pláss, har vit kundu spæla úti. Vit vóru nøkur børn tá og vit høvdu tað fínt saman, sigur Sólvá, sum spældi serliga nógv við systur sína, sum er tvey ár yngri enn hon.

Júst hetta, at hon er von við at hava fá vinfólk í nánd av sær, er eitt ið er henni til fyrimunar í dag, kann ein siga.

- Ja, tá man er vanur við at man er bara ein her, so kann man gott klára at búgva herúti. At eg eri einasta ungfólkið í bygdini, er í øllum førum ikki nakað eg hugsi so øgiliga nógv um, heilt erliga.

- Eg trúgvi, at tað hevði verið nógvar ferðir verri, um eg skuldi flutt av einum stórplássi og út higar. Tá hevði tað ikki verið tað sama, slær hon fast.

## Eg føli meg altso ikki einsamalla herúti, sjálvt um onkur kanska kundi hildið tað

### Dagarnir ganga

Sólvá er von við at hava fá børn rundan um seg. Nú hon er farin um tey 24 árini, er hon yngsta fólkið á oynni.

- Men, slær hon fast. - Eg føli meg altso ikki einsamalla herúti, sjálvt um onkur kanska kundi hildið tað.

- Og eg fái so sanniliga dagarnar at ganga, eisini nú ið tað er tann myrka árstíðin.

Hon hevur atgongd til alnetið og teir møguleikar, sum tað gevur fyri samskifti við onnur. Og í barnaheimið er eisini ein parabolur knýttur.

- Sjálvandi behøvist man ikki at hyggja í sjónvarp allatíðina. Eg gangi mær onkutíð ein túr ella eg baki onkrar køkur, lesi onkra bók ella okkurt heilt annað.

- Man kann altíð finna uppá okkurt, um man bara tímir. Og eg tími væl hetta ymiska, slær hon fast.

- Men eitt dugi eg ikki: Eg dugi faktist ikki at binda, men kundi gott hugsað mær at lært tað.

snorri@sosialurin.fo